## Banki ikki viðhald

Eik Banki hevur ikki rætt til patentið uppá trollemmarnar hjá Helga Larsen í Vági. Tað hevur vestari landsrættur gjørt av, visti Útvarpið at siga í gjár. Injektor Door í Danmark fyrireikar nú endurgjaldskrav ímóti Eik, sigur Jan Allan Müller, stjóri, sambært Útvarpinum. Hann og Helgi Larsen gjørdu av at kæra avgerðina, tá Eik Banki í januar fekk viðhald í býarrættinum í Horsens, fyri landsrættin. Nú hevur Landsrætturin viðgjørt málið, og úrslitið er, at avgerðin í Horsens verður ógildað og kravið um úttøku í patentinum ikki verður gingið á møti. Eik Banki skal gjalda sakarmálskostnaðin fyri Helga Larsen í báðum rættunum, sum er tilsamans góðar 166.000 krónur.



## Nýtt skip til Vestmanna

Fríggjadagin kemur nýtt línuskip til Vestmanna. P/F Vest Trading við Háldan Haldansen hevur keypt Vesturhav, sum er gamli Strandingur. Vesturhavið er bygt á Skála í 1963. Skipið er knappar 37 metrar til longdar, 7,5 metrar breitt og 202 bruttotons. Skipið, við skrásetingarnummarinum VN 700, er júst høvuðsumvælt á Skála. Við Vesturhavinum verða 14 mans. Frammanundan eigur P/F Vest Trading skipini Gullberg og Thomas Nygaard. Sostatt hoyra nú trý stállínuskip til Vestmanna. Hesi tíðindi ber heimasíðan hjá Vestmanna kommunu.

# Føroyingar trýstir í land - útlendingar umborð

**Eimskip selir skip og fremur sparingar umborð á verandi skipum. Hetta gongur útyvir føroysk sjófólk, sum missa arbeiði til fyrimuns fyri eysturevropearar, ið eru bíligari arbeiðsmegi**

UPPSAGNIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Herfyri seldi Eimskip farmaskipið Skuran og segði manningina upp. Nú hevur felagið sagt fleiri monnum upp umborð á farmaskipinum Nordland – til fyrimuns fyri eysturevropearar, sum eru bíligari arbeiðsmegi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Farmaskipið Norðland, sum P/F Heri Thomsen í Gøtu í sínari tíð keypti, hevur seinasta árið siglt í Noregi og aðrastaðni.

Í dag er tað Eimskip, sum eigur hendan parting av virkseminum hjá gøtumonnum.

Herfyri seldi Eimskip farmaskipið Skuran og segði alla manningina úr starvi.

Tá segði stjórin í Eimskipum í Føroyum, Jóhanna á Bergi, at Skurin er eitt lutfalsliga lítið og gamalt skip, og at felagið eigur nógv skip at taka av.

Hon segði, at sølan var ein liður í rationaliseringini hjá felagnum.

### Fleiri uppsagnir

Nú hevur felagið, sum stendur aftanfyri Nordland, í fyrsta lagi sagt dekkarunum úr starvi vegna sparingar, sum tikið verður til í uppsagnarbrævinum, ið er dagfest 31. mai.

Jóhanna á Bergi, stjóri í Eimskipum, er í løtuni í Íslandi, og hon svaraði ikki telefonini, tá vit fregnaðust í morgun.

Keldur í felagnum siga fyri Sosialinum, at einir 8 mans eru sagdir úr starvi, og at ætlanin er at mannað hendan partin av skipinum við fólki eystaneftir.

- Tey skip, vit kappast við á hesum leiðum, hava lægri manningarútreiðslur, og skulu vit standa okkum, noyðast vit eisini at minka um manningarútreiðslurnar, siga keldurnar.

- Í uppsagnarbrævinum, sum er undirskrivað av Tórhalli Thomsen, útgerðarmanni, stendur, at vit eru uppsagdir vegna sparingar, sigur hann.

Dekkarin sigur, at hann eisini veit um kokk og fyrsta meistara, sum eru uppsagdir í hesum viðfangi.

- Nei, hetta hevði eg slett ikki væntað, og eg vóni, at felagið hevur onkran annan møguleika til okkara, sum nú noyðast at gevast umborð á Nordland.

### Vónsvikin

Ein av manningini, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur seg vera ógvuliga vónsviknan, nú tað er greitt, at aðrir skulu taka upp arbeiði hjá okkum.

- Eg havi bara verið ein túr við Norðland, men tá eg mynstraði, fekk eg lovað, at eg kundi fáa ta siglingstíð, eg ynski mær fyri at fáa vinnubræv.

Dekkarin, sum annars er útbúgvin skipari, sigur, at vegurin frame r siglingstíðin, um tú seinni skalt kunna gerast skipari.

- Eg segði mitt arbeiði upp fyri at fara við Norðland, men nú eri eg longu sagdur úr starvi aftur.

Dekkarin sigur, at teir hava verið 9 mans umborð á Norðland á hvørji vaktini, og teir hava verið seks vikur umborð og síðan seks í landi.

### 53 havnir

Á seinasta túri hjá dekkaranum var Nordland í tilsamans 53 havnum.

Nordland siglir millum norskar havnir og havnir í eitt nú Póllandi, Týsklandi og Danmark og onkuntíð er skipið eisini í Svøríki.

- Vit hava siglt undir føroyskum flaggi, sigur dekkarin.

Keldur í felagnum siga, at Nordland ætlandi verður verandi undir føroyskum flaggi, nú sparingar skulu fremjast við at taka nakrar eysturevropear umborð.

# Kommunan keypt bygning

**- Hetta er ein fyribils loysn, nú vit eru í trongstøðu við fyrisitingini av kommununi, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

SØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrisitingin av Tórshavnar kommunu er spjadd ymsastaðni í Havnini, og hetta er ikki nøktandi fyri ta tænastu, sum kommunan eigur at veita sínum borgarum.

Tað heldur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

- Vit hava nú keypt bygningin í Fr. Petersensgøtu, har Advokatskrivstovan húsast. Men hetta er bara ein fyribils loysn. Ætlanin er at flyta ein part av fyrisitingini í hendan bygningin um mánaðarskiftið juli/ august, men enn hava vit ikki tikið endaliga avgerð um, hvør partur fer út í Fr. Petersensgøtu.

Borgarstjórin sigur, at hann hevur ikki keypsupphæddina í høvdinum, nú vit høvdu hann í telefonini í morgun, men hann heldur, at prísurin liggur um 6-7 miljónir krónur.

- Vit eru í trongstøðu við fyrisitingini, sum í dag er á eini átta ymiskum støðum. Hetta er ikki nøktandi fyri borgararnar.

Heðin Mortensen sigur, at tá endalig greiða er fingin á, hvar ein samlað fyrisiting av kommununi skal verða, verða fleiri bygningar, sum Tórshavnar kommuna eigur, seldir.

- Málið hjá okkum er at savna alla fyrisitingina av kommununi undir sama tak, sigur borgarstjórin.



*- Vit eru í trongstøðu við fyrisitingini, sum í dag er á eini átta ymiskum støðum. Hetta er ikki nøktandi fyri borgararnar. Keypið av ognini í Fr. Petersensgøtu er ein fyribils loysn, sigur Heðin Mortensen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*